# Degns hús við óvissari lagnu

**Húsini eru verd at varðveita, men óvissa er um heimildina**

HAVNAMYND

**Havn:** Jógvan á Lakjuni hevur nú tikið avgerð um ikki at staðfesta tilmælið hjá Fornminnisnevndini í málinum um Degnshús.

Fornminnisnevndin hevði annars mælt landsstýrismanninum til at friða ognina, ið vanliga verður nevnd Degnshús við Tinghúsvegin í Havn.

Tilmælið er grundað á eina meting hjá Fornminnisnevndini um serliga húsasniðið, upprunastandin og søguliga umhvørvið.

Landsstýrismaðurin tekur kortini undir við sjónarmiðinum um, at ognin er verd at varðveita.

– Hinvegin er tað tó ivasamt, um tað við støði í lógini um friðan av fornminnum og bygningum er



*Degns hús við óvissari lagnu*

neyðugt at friða Degnshús til tess at tryggja varðveitsluna, sigur Jógvan á Lakjuni.

Fornminnissavnið hevur eisini í tilmæli sínum til Fornminnisnevndina víst á, at tað er ivasamt, um tað tænir húsinum best at friða tey. Landsstýrismaðurin er samdur í hesum sjónarmiði og metir, at málið verður ikki loyst á skilabestan hátt við so víðgongdum stigi sum friðing.

Málið snýr seg sambært meting landsstýrismansins í roynd og veru um varðveitslu av ávísum øki við Vaglið og niðara part av Tinghúsvegnum. Varðveitingin av nevnda øki verður best tryggjað við heimild í byggi- og býarskipanarlógini eins og gjørt er við aðrar partar av gomlu Havnini.

## Sampakkar ikki

Petur Olsen er ein teirra, sum fylgir væl við í orðaskiftinum um Degns Hús.

Hann hevði ætlanir um at byggja ein skrivstovubygning á økinum, men tá henda ætlanin kom fram fóru fólk at savna inn undirskriftir ímóti hesum.

Tí varð ætlanin í fyrsta umfari slept.

Nú Jógvan á Lakjuni hevur tikið støðu í málinum, og at fleiri politikkarar vóru frammi og søgdu at húsini áttu at verðið varðveitt, hevur hann sent býráðnum skriv um málið. Skrivið kallar hann »Friðing av Anton Degn – húsinum, sum undirritaði eigur«.

Petur Olsen sigur, at hann nú er áhugaður í at fara til samráðingar við býráðið um umsókn hansara um eitt byggiloyvi á økinum.

# Frystir fyrst á Sundi og Runavík

**Koyrilíkindini í útvarpinum er hent hjá bilførarunum. Nú skulu tey gerast enn betri og tryggari**

FERÐSLUTRYGD

Flest allir føroyingar hava hoyrt koyrilíkindini í útvarpinum. Tað er Landsverk, sum í mong áratíggjur hevur savnað hesar upplýsingar, og nógvar aðrar við, ið snúgva seg um veðrið.

Umframt at savna upplýsingar um koyrilíkindi við at fara út á vegirnar, savnar Landsverk somuleiðis upplýsingar um veður og vind í veðurstøðum, ið eru settar upp ymsa staðni í landinum.

Fleiri teirra máta bert vind og fukt í luftini, men nakrar máta eisini hita og fukt á vegabreytini. Hetta seinna er sera hent, tá metast skal um koyrilíkindini.

Í vetur hevur Landsverk kannað, hvar vegurin frystur fyrst. Mátingarnar hava víst, at omanfyri timburhandilin í Runavík og á Sundi gerst skjótt hált, tá broytingar eru í veðrinum, upplýsir heimasíðan hjá Landsverki.

Tvær nýggjar veðurstøðir eru settar upp á hesum plássum, og Landsverk arbeiðir nú við skipanini, sum skal taka ímóti upplýsingum frá veðurstøðunum. Og fleiri veðurstøðir skulu setast upp, har hálkan fyrst ger um seg.

sb.



*Veðurstøðirnar framvið vegunum geva neyvar upplýsingar um hálkuna*



*Tøkniliga menningin hevur gjørt, at hesar fráboðarnir nú gerast neyvari og neyvari*